# TÍÐINDI

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

*»Vit fara at leiga eitt flogfar afturat.«*

*- Jóhan E. Simonsen, stjóri hjá Faroe Jet*

## Faroe Jet hækkar partapeningin

**Tað gongur væl hjá Faroe Jet í løtuni, váttar stjórin, Jóhan E. Simonsen. - Í løtuni eru flogførini hjá okkum eitt sindur skiftandi. – Summi eru full, meðan onnur eru hálvfull, men vit hava væl fleiri bíleggingar nú enn fyri nøkrum vikum síðani, sigur Jóhan E. Simonsen. Í næstum fer felagið somuleiðis at hækka eginpeningin við at tekna nýggjan partapening.**

VINNULÍV
*Lív Højsted Horsdal*
*horsdal@sosialurin.fo*

- Fleiri og fleiri ferðast við okkum – ung sum gomul. Í mai mánaði høvdu vit nógv ferðandi, tí vit byrjaðu við sera bíligum ferðaseðlum. Men í juni og fyrst í juli vóru flogførini hjá okkum ikki líka full. Hetta komst av, at flest øll høvdu keypt sær flogferðaseðlar, áðrenn vit komu á marknaðin. Men nú er summarsølan við at hæsa av, og bíleggingarnar eru hækkaðar munandi, staðfestir Jóhan E. Simonsen.

Leysasøgur vilja vera við, at tit ætla at hækka eginpeningin við at tekna nýggjan partapening. Er tað satt?

- Ja, men tað er ikki tí, at tað hevur gingið illa hjá okkum – tvørturímóti. Vit hava ætlað okkum frá fyrsta degi av at leiga enn eitt flogfar, og tað er í hesum sambandi, at vit ætla at hækka eginpeningin og tekna nýggjan partapening. Í løtuni arbeiða vit ítøkiliga við tí, og í næstum fáa vit at síggja, um tað fer at eydnast okkum.

Spurdur, um hann metir, at tað er tørvur á enn einum flogfarið í Føroyum, svarar Jóhan E. Simonsen uttan himpr, at tað er tað avgjørt:

- Vit ætla ikki, at nýggja flogfarið skal flúgva rutuflúgvingina millum Føroyar og Danmark. Vit ætla at víðka um virksemið hjá okkum við at skipa fyri leiguflúgving. Ætlanin er, at vit í seinasta lagi fyrst í 2007 hava nýggja flogfarið og fara tá at bjóða okkum út at flúgva fyri onnur feløg, sigur Jóhan E. Simonsen at enda.




*Faroe Jet fer í næstum at hækka eginpeningin vi› at tekna nýggjan partapening.*

Føroyingar í Ísrael:

## Flýggja undan rakettálopum



Fríggjadagin í síðstu viku skrivaðu vit um Heidi Vinther, sum býr í ísraelska býnum, Maalot, saman við familjuni. Tá var økið júst rakt av rakettálopum frá Hizbollah og familjan helt til í einum bumbuskýli og livdi av dósamati. Seinastu vikuna eru fleiri rakettir skotnar niður í býin, og Heidi hevur tískil valt at flýggja saman við familjuni til Tel Aviv:

- Tey eru farin at vitja nøkur vinfólk fyri at finna tryggleika. Tey koyrdu sjálvi við bili úr Maalot og til Tel Aviv, og tað gekk væl. Nú hava tey verið har í tveir dagar og hava tað gott. Meðan tey hava verið burturi, eru enn fleiri smáar rakettir skotnar niður í Maalot, men sum skilst, er einki hent við húsunum hjá teimum, sigur pápi Heidi, Súni Vinther, sum situr heima í Føroyum og fylgir við støðuni hjá dóttrini.

**-horsdal**

*Dóttir Súna og Titu Vinther, Heidi Vinther, er nú í Tel Aviv saman við familjuni. Tey hava tað gott.*



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur:

## Summarveður á G!



Næstu dagarnar verður summarveður kring alt landið, sigur Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur:

- Um vikuskiftið verður gott veður. Í morgin verður lítil og eingin vindur, kanska nakrir fáir mjørkaflókar, men annars sól. Sunnudagin klárnar í luftini, so tá verða eingir mjørkaflókar. Tey, ið ætla sær ella eru á G! Festivali í Gøtu, skulu ikki stúra. Hitin fer at liggja millum 15-20 stig um dagin, og um næturnar verða 10 stig, sigur Petur Skeel Jacobsen og leggur afturat, at góða veðrið heldur fram fyrst í næstu viku.

**- horsdal**

## Flest øll koyra sámiliga á G!

Í sambandi við at G! Festivalurin er í hesum døgum, fer løgreglan kring landið at kanna, um fólk koyra sámiliga. Við rundkoyringina á Hvítanesvegnum tók løgreglan í Havn heili 85 bilar í nátt, tá Kaizers Orchestra og Páll Finnur Páll høvdu spælt í Gøtu í nátt:

- Eingin varð tikin fyri rúsdrekkakoyring. Í síni heild haldi eg, at fólk í dag eru meira tilvitað um, at tey ikki skulu koyra, tá tey hava drukkið. Í dag fara flest øll í býin við tí fyri eygað at koyra við hýruvogni heim aftur. Somuleiðis er tað framúr, at náttarbussar eru komnir, sigur vakthavandi á løgreglustøðini í stuttari viðmerking.

**- horsdal**

G!

